# Deildarstjóri til SEV

**Hjá Elfelagnum SEV er starvið sum deildarstjóri fyri fyrisitingina leyst at søkja. Vit sóknast eftir einum dugnaligum leiðara, sum hevur hægri útbúgving innan búskaparfrøði og eina fortíð innan leiðslu frá privatum vinnulívi ella almennari umsiting, og sum hevur góð úrslit og avrik at vísa á. Viðkomandi royndir við samstarvi á politiskum og umsitingarligum stigi hevur eisini týdning.**




## Høvuðsuppgávurnar
Deildarstjórin fyri fyrisitingina hevur ábyrgdina av fyrisitingini, starvsfólkaøkinum, debitorbókhaldinum og fíggjarbókhaldinum og hevur skyldu til á hesum økjum at ansa eftir, at fyrisiting, umsiting av virkjum og virkisarbeiðir elfelagsins verða gjørd á besta hátt, eins og ábyrgd av, at gjørt verður eftir teimum lógum og reglum, sum hitt almenna fyrisetur.

## Førleikakrøv
Vit vænta, at tú hevur:
- hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni innan búskaparfrøði
- hollan kunnleika innan fyrisiting
- leiðsluroyndir
- góð evni at samstarva og samskifta
- góðar málførleikar í føroyskum, donskum og enskum.

## Setanartreytir
Starvið er lønt samsvarandi sáttmála við avvarðandi fakfelag við tilhoyrandi viðbót. Aðrar setanartreytir verða sambært nærri avtalu.

## Fleiri upplýsingar
Um tú vil hava meira at vita um starvið, kann tú seta teg í samband við Hákun Djurhuus, stjóra, á tel. 346800 ella 211161. Eisini ber til at senda teldupost til hd@sev.fo. Allir fyrispurningar verða viðgjørdir í trúnaði.

## Umsóknarfreistin er 27. apríl 2011.
Umsóknir og CV skulu sendast til:

Elfelagið SEV
Landavegur 92
Postsmoga 319
110 Tórshavn

*Stílað: Hákun Djurhuus, stjóri*

SEV

SEV er interkommunalur felagsskapur og størsti elframleiðari í Føroyum. SEV eigur elnetið og hevur veitingarskyldu, sum ber við sær, at tað er álagt felagnum at veita vinnulívinum og øllum føroyingum støðugan streym alt samdøgnið eftir tørvi. SEV er eftir føroyskum mátistokki ein stór fyritøka, sum í 2010 umsetti fyri 281 milliónir krónur. Umleið 150 fólk starvast hjá SEV.

HALDARALEPI

Verður sent ópostað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Nýggi

# Sosialurin

*Tekna teg sum haldara fyri einans*

kr. 400,- um ársfjórðingin

**Ja takk!**

Eg ynski at tekna meg sum haldara av nýggja Sosialinum, og fái blaðið borið út trýggjar ferðir um vikuna

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Telefon: ____________________

teldupost: ____________________

Sosialurin
Boks 76, FO-110 Tórshavn